KPMG

# Grannskoðarar við royndum og ungir grannskoðarar

Orsakað støðugt vaksandi virksemi og av tí at tveir av okkara grannskoðarum fara at fáa sær víðari útbúgving hjá ávíkavist KPMG í Keypmannahavn og KPMG í Madrid, hava vit brúk fyri at seta fleiri grannskoðarar í starv til heystar.

**Starvslýsing**
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

## Grannskoðarar við royndum og/ ella við ástøðiligari útbúgving

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum tað dagliga arbeiðið, skulu tey, sum verða sett í starv, nema sær víðari ástøðiliga útbúgving.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Roknað verður við, at umsøkjarar hava útbúgving sum siviløkonomar (HA), hava lokið HD-prógv ella cand.merc.aud., og eru áhugaðir at halda fram við at útbúgva seg.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Møguleiki er fyri at nema sær tær praktisku og ástøðiligu royndirnar, sum skulu til fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

## Ungir grannskoðarar

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið, skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava lokið HH-prógv, og verða áhugaðir í framhaldandi útbúgving.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 15. mai 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

***KPMG í Føroyum er føroysk ogn burturav. Samstundis eru vit limir í KPMG International, sum er eitt tað størsta grannskoðanarsamtakið í heiminum.***
***Okkara mál er at veita tænastur innan grannskoðan, roknskaparhjálp, fíggjarstýring, skatt og mvg v.m. á hægsta góðskustigi.***
***Í Føroyum hava vit ein góðan og breiðan kundaskara bæði innan handil, ídnað, peningastovnar og fíggjarstovnar eins og kommunur og landið.***
***Støðuga útbúgvingin av starvsfólkunum og góðskustýring okkara ger okkum væl fyri at loysa tær uppgávur, sum verandi og komandi kundar, bæði føroyskir og útlendskir, ynskja loystar av okkum.***
***Í løtuni starvast 22 fólk hjá felagnum.***

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team 85 • 31 65 11



# AEROBIC OG SPINNING

## NÚ BYRJA VIT AFTUR

**Yndi** ***kann bjóða flest øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.***

**Byrjað verður aftur mánadagin, 01. mai og halda vit á til leygardagin, 24. juni.**

**Nýtt Nýtt Nýtt SPINNING Nýtt Nýtt Nýtt**

**Sum nakað spinnandi nýtt kunnu vit nú fyri fyrstu ferð í Føroyum bjóða tímar í SPINNING, sum seinastu árini er vorðin sera vælumtókt víða um. SPINNING er sera gott fyri ♥, lungu og blóðrenslið sum heild. Eisini er SPINNING sera konditiónsstimbrandi og samstundis ein ógvuliga góður háttur at klænka seg. Samstundis kann SPINNING íðkast av øllum, eisini teimum við veikum liðum ella ryggi.**

**Tíðirnar eru:**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| | 19:00 – 19:50 Spinning *Byrjarar* | | 18:30 – 19:20 Spinning *Byrjarar* |
| 18:30 – 19:30 Spinning *Vand* | 20:00 – 21:00 Spinning *Vand* | 18:00 – 18:50 Spinning *Byrjarar* | 19:30 – 20:30 Spinning *Vand* |

**KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ**

| | | Skúlanæmingar |
|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna: | 300 kr. | 20% avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 490 kr. | 20% avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 650 kr. | |

**AEROBIC**

**Trimmari – Aerobic – Stepp + styrkivenjing – Venjing uttan hopp – Mix.**

**Tíðirnar eru:**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:30 - 18:45 Aerobic *Vand* | 18:00 - 19:00 Stepp *Øll* | 17:15 – 18:15 *Tilkomnar kvinnur* Low | 17:15 – 18:30 Stepp + Styrki *Øll* |
| 18:45 - 19:45 Aerobic *Byrjarar* | 19:00 – 20:00 Trimmari *Øll* | 18:15 – 19:15 Aerobic *Byrjarar* | 18:30 - 19:30 Aerobic *Øll* |
| | 20:00 - 21:15 Mix strævin *Vand* | | |

**KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ**

| | 60 min. | 75 min. | Skúlanæmingar |
|---|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna : | 300 kr. | 375 kr. | 20 % avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 490 kr. | 600 kr. | 20 % avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 650 kr. | 810 kr. | |

## Vigar tú ov nógv? ....Her er kjansurin!

## Trimma & Spinn

**FEITTKNÚSARI**

**Sum nakað nýtt bjóða vit teimum, ið viga meiri enn 10 kilo ov nógv, venjing tvær ferðir um vikuna. Byrjað verður við styrkivenjingum fyri búk, rygg, enda, armar og bein. Síðani verður farið at spinna, har tað serliga er blóðrenslið og feittbrenningin, ið dentur verður lagdur á.**

**Tíðirnar eru:**

| Mánadag | Mikudag |
|---|---|
| 19:45 - 20:15 Trimm<br>20:15 - 21:15 Spinn | 19:15 - 19:45 Trimm<br>19:45 - 20:45 Spinn |

**KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ**

650,- kr.

**Fá meira at vita hjá Yndi, kom framvið og fá tær ein faldara og eitt prát. Møguligt er at fáa ókeypis royndartíma í SPINNING og AEROBIC. Møguleiki er hjá feløgum, fyritøkum o.ø. at leiga tímar í Yndi.**

**Tilmelding verður í Yndi, Yviri við Strond 21, leygardagin tann 29. apríl frá kl. 15.00 til kl. 17.00**

**Komið inn á gólvið ella ringið á tel.: 311 311, 310 025 ella 312 868.**



YNDI
*v/ Elsu Mariu Bærentsen*

Sosialurin - 311820

**Yviri við Strond 21**
**FO-100 Tórshavn**
**Tlf.: 311 311**
**Fax: 318 527**
e-mail: yndi@post.olivant.fo



sosialurin
-har tað hendir




Viðmerking:

# Kynsdiskriminering?!



Umboð løgtingsins, løgtingsumboðið ella løgtingsins umboðsmaður.

Tað er at undrast stórliga á, at løgtingsnevndin, sum hevur latið álit úr hondum í lógaruppskotinum um løgtingsins umboðsmann, sigur seg ikki føra fyri at finna eitt kynsóheft heiti til henda nýggja stovn.

Hóast ein samd málnevnd heitir á løgtingið at finna annað hóskandi orð, og eisini kemur við uppskotum, heldur løgtingsnevndin fast við, at onki annað enn bert tað eina heitið er nøktandi. Hvør orsøkin er, ella hvørjar grundgevingarnar eru, kundi verið áhugavert at frætt, tí í ár 2000 at gera starvsheiti við endingini ” —maður”, nærkast eini niðurgerðing av kvinnunum, sum telja helvtina av Føroya fólki.

Løgtingsnevndin sigur í áliti sínum, at ”nevndin hevur havt drúgt orðaskifti um hetta, men tað hevur tó ikki verið møguligt at finna eitt heiti sum hóskar, serliga tá hugsað verður um tað innihaldið, sum lógaruppskotið leggur í starvið.”

Hvat hetta orðaskifti hevur snúð seg um kann bert gitast um, men um tað er endingin ”maður”, sum nevndin heldur, gevur heitinum so serligan týdning og starvinum eitt so serligt innihald, so onki annað heiti yvirhøvur kann koma uppá tal, so sigur hetta ikki so lítið um hugsunnarháttin og manglandi hugflogið hjá løgtingslimunum.

Kvinnur í dag identificerað seg ikki við menn og hava trupulleikar av slíkum starvsheitum, sum bert venda sær til menninar. Málið skal venda sær til bæði kynini. Hví skal ein kvinna í hesum starvinum finna seg í at vera nevnd umboðsmaður. Hon er ikki maður, men kvinna, og er tað óhøviskt framhaldandi tvíhalda um mannin í nýgerð av orðum, sum um at kvinnurnar ikki eksistera. Á teimum økjum, har kvinnurnar hava verið virknar eru heitini kona og kvinna brúkt, flakakvinna, neytakona osv. . Nú kvinnurnar koma inn á alt fleiri arbeiðsøki, er tað ein sjálvfylgja, at málið fylgir við her eisini. Hetta stendur eisini greitt í tilmælinum frá málnevndini, men sum ikki verður lurtað eftir.

Hví lógin ikki kann eita t. d: ”Lóg um umboð løgtingsins” og tað í lógartekstinum annars verða sagt ”løgtingsumboðið” er óskiljandi. Hvat sermerkt verður við starvinum, um ”maður” verður krøkt uppí. Tað, sum er avgerandi, er, at ”løgtingsumboðið” verður valt av løgtinginum og arbeiðir eftir lógini, og framgongur tað eins greitt av heitinum ”løgtingsumboðið”, at hetta er umboð løgtinsins, sum um umboðið verður kallað ”-maðurin“.

Vit hava í dag dømi um Ríkisumboðið. Nú ríkisumboðið gjørdist kvinna, fer heitið ríkisumboðsmaður í bakgrundina, sum vituligt er. Fyri hvønn dag sum gongur, tykist tað meir øvugt at nevna hana ríkisumboðsmaður. Soleiðis eisini við løgtingsins umboðsmanni eins og øðrum orðum við. Tað kennist í dag diskriminierandi bert at nevna menn og ikki kvinnur í frásøgum, fyrilestrum, samrøðum og allastaðni yvirhøvur. Strembast skal tí ímóti einum málbrúki, sum vendir sær til bæði kynini. Lættast verður hetta gjørt við kynsóheftum orðum.

Einasta grundgevingin løgtingsnevndin kann hugsast at hava fyri heitinum umboðsmaður er, at soleiðis gera tey aðrastaðni. Men tað er ongin grundgeving í sjálvum sær. Tað er ikki heitið sum skapar stovnin, men tað sum lagt verður í heitið. Løgtingsumboðið skal vera okkara egna og fylgja okkara føroysku lóg. Annars kann minnast á, at tað eisini er skyldan hjá løgtingingum at fylgja hugburðinum í okkara egnu javnstøðulógini, sum fevnir um at hava atlit fyri báðum kynum og sum eisini fevnir um málburð og orðagerð.

Hugburðurin í løgtinginum til javnstøðulógina vísir seg í eini viðgerð av máli sum hesum. Um tað verður soleiðis at meirilutin í nevndini fær sín vilja við ”manninum”, hóast kvinnurnar og teir tilvitaðu menninir í tinginum hava ynskt tað øðrvísi, so er hetta enn eitt dømi um hvussu trong kor javnstøðuhugburðurin, sum merkir virðingin fyri hvørjum øðrum, hevur á løgtingið - hóast ofta verður sagt annað í orðum.

**Vegna javnstøðunevndina**
**Turið Debes Hentze, fork.**

# Leikadagur

*Elin K.Mouritsen skipar fyri innsavnan av leikum til børn í Rumenia og Albania*

Leikudagur‘98, sum verður nú mikudagin 3. mai, fer í at samla leikur inn til børn í flóttalegum, og til børn í Rumenia og Albania, har stórur tørvur er á leikum.

Elin Mouritsen, sjónleikari, sum stendur fyri tiltakinum, hevur aftur í ár sett seg í samband við Birgir Andreassen, ið hevur játtað, at Kosovo-Rumenia hjálpin skal fáa leikurnar fram til børnini.

Heili 50 $m^3$ av leikum komu inn í fjør.

Kosovu-Rumenia hjálpin fekk tær fram til børnini í flóttalegunum.

Elin takkar hjartaliga øllum teimum fólkum,sum í fjør vóru við til at gera Leikudag’98 so væleydnaðan,og vónar,at fólk vísa somu vælvild í ár.

Innsavningin verður mikudagin 3.maj frá kl.13.00 til 18.00 uttanfyri Ide-Møblar á Hálsi, har ein bingja stendur til endamálið.Elin saman við øðrum taka ímóti leikunum.


# DUGIR TÚ AT SELJA FISK?

Dugir tú at selja fisk, er tað kanska júst tær, vit leita eftir.

**Vit bjóða tær:**

- eitt starv í eini fyritøku í støðugari menning
- eitt starv við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- eitt starv innan samskipan av tøku og sølu av laksi
- eitt starv innan samskipan av framleiðslu og sølu av feskum úrdráttum
- eitt starv innan kundarøkt

Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

**Okkara vón er:**

- at tú hevur náttúrligar eginleikar sum sølufólk
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú hevur førleika innan vørumenning
- at tú hevur góðan málførleika
- at tú hevur teldukunnleika

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 441002 og tosa við Páll Gregersen.

Umsóknarfreistin er 17. mai 2000

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

**P/F PRG Export umsetti í 1999 fyri 161 mió. Fyritøkan selur fisk til Evropeiska meginlandið og Amerika, og arbeiðir í neyvum samstarvi við framleiðsluvirkið P/F Fiskavirkið og alifelagið P/F Luna og selur allar vørurnar fyri hesi feløg.**

PRG EXPORT
P.O. Box 29 · FO–510 Gøtu · Faroe Islands
Tel +298 441002 · Fax +298 441766

SANSIR TEL 355 355